## Sheva aftur til Milan

Síðsta árið hevur ukrainski landsliðsleikarin, Andriy Shevchenko, leikt við enska stórfelagnum Chelsea. Fyrsta kappingarárið á enskum fótbólti hevur tó ikki gingið heilt eftir vild hjá vandamikla áleyparanum. Nú er tó líkt til, at Shevchenko kann vera á veg aftur til AC Milan. Eigarin hjá Milan, Silvio Berlusconi, segði fyrr í dag, at felagið arbeiðir við at fáa Shevchenko aftur til felagið. – Tá ið eg tosaði við varaforsetan Galliani, segði hann, at handilin var næstan komin í hús. Shevchenko vil aftur til Milan. Og felagið hevur ongar trupulleikar at gjalda lønina.



## 826.000 krónur? Nei takk!

Áleyparin hjá Charlton, Darren Bent, hevur sagt nei takk við West Ham, sum hevur boðið honum ein sess í teirra álopi og 826.000 krónur um vikuna í løn. 23 ára gamli áleyparin vantaði annars bara at fáa persónligu viðurskiftini upp á pláss, tí West Ham vildi rinda tað, sum Charlton krevur – nevniliga 187 milliónir krónur. Men í síðstu løtu valdi ungi áleyparin at taka seg úr samráðingunum, og soleiðis heldur at spæla í næstbestu ensku deildini við Charlton komandi kappingarár, skrivar danska Ekstra Bladet.

## Keflavík fekk fult

Í Íslandi spæla teir flestu landskappingardystirnar í fótbólti mitt í viku. Í gjárkvøldið hevði Keflavík vitjan av høvuðsstaðarfelagnum Fram. Símun Samuelsen og liðfelagarnir vunnu 2-1, eftir at teir høvdu verið á odda 1-0, og eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 1-1.

Eftir seks umfør hevur Keflavík ellivu stig, og tað røkkur til triðja plássið.

FH, sum í gjárkvøldið vann 2-0 á útivølli ímóti KR, er oddalið. KR, sum Rógvi Jacobsen í síni tíð umboðaði, er aftast. Høvuðsstaðarfelagið hevur bara fingið eitt stig burturúr seks teimum fyrstu umførunum.

Hini úrslitini í 6. umfari vóru hesi: Valur-Víkingur 3-1, Breiðablik-ÍA 2-0 og Fylkir-HK 1-0.

Í 7. umfari skal Keflavík mikudagin 20. juni spæla á útivølli í Reykjavík ímóti Víkingi.

## KÍ og NSÍ í finaluni

Unglingarnir hjá KÍ og NSÍ fara mikudagin 27. juni at spæla steypafinalu á uttanveltaðum vølli. Longu 9. mai vann KÍ hálvfinaluna á heimavølli ímóti B68 3-2. Í gjárkvøldið vann NSÍ á heimavølli 2-0 á HB. Talan var bara um ein dyst í hálvfinaluni.

Tað var málleyst í Runavík, inntil tað restaði ein lítil løta. Tá skoraðu Einar Hansen og Øssur Dalbúð fyri NSÍ.

Merkisvert var tað, at unglingarnir hjá NSÍ, sum eru fastir menn á Formula liðnum – Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen og Bogi Løkin – allir vórðu skiftir inn beinanvegin eftir steðgin, meðan einki sást til HB unglingar, sum eru partur av Formula liðnum – eitt nú Pætur Jørgensen og Ólav í Ólavstovu.



*Ógvisligt sá tað út, tá Kubica soraði bilin móti ikki færri enn tveimum veggum hvør síni megin breytina*

*Mynd: polfoto*

# Kubica koyrir ikki á Indianapolis

**Hetta vikuskiftið er formil 1 í Indianapolis. Eftir ógvusliga óhappið seinasta sunnudag, var stóri spurningurin um pólski formil 1 koyrarin Robert Kubica fór at koyra hetta vikuskiftið. Tað ger hann ikki. Ein 19 ára gamal týskari koyrir í hansara stað**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í gjár gjørdist greitt, at pólski BMW koyrarin Robert Kubica ikki luttekur hetta vikuskiftið, og at 19 ára gamli týskarin Sebastian Vettel koyrir fyri hann. Robert Kubica slapp við einum keiktum fóti og heilaskjálvta eftir eitt av teimum ógvusligastu óhappunum í formil 1 í fleiri ár. Læknaliðið í formil 1 var samt um, at Kubica var frískur aftur, men heittu teir samstundis á hann, um ikki at koyra. Serliga, tí eitt nýtt óhapp so stutt eftir ein heilaskjálvta kundi vera sera vandamikið. Hesa avgerð virdu bæði Kubica og BMW. Hetta verður fyrsta formil 1 koyringin hjá royndarkoyraranum Sebastian Vettel, men fyribils eisini tann síðsta, tí tað tykist eingin ivi at vera um, at Kubica verður aftur á breytini í Fraklandi 1. juli.

### Trýstið er øgiligt

Tvær tær seinastu koyringarnar hevur McLaren verið nógv tað besta liðið á breytini. Tað var greitt í kanadisku koyringini, at tvífaldi heimsmeistarin Fernando Alonso ikki kendi seg væl, tá hansara óroyndi liðfelagið Lewis Hamilton setti hann upp á pláss. Alonso hevur ongantíð áður veruliga verið undir trýsti frá einum liðfelaga, og við nógvum villum vísti Alonso, at tílíkt trýst ikki er optimalar umstøður fyri hann. Í vikuni síðan kanadisku koyringina hevur Alonso eisini víst, at hann kennir seg sum ein trýstan mann. Tvífaldi heimsmeistarin man vera ein av best løntu formil 1 koyrarunum, og í Monako gav McLaren liðið unga liðfelaga hansara boð um at halda seg aftan fyri Alonso. Men hóast hetta segði Alonso í vikuni við eitt spanskt blað, at hann kendi, at liðið stuðlaði Hamilton meira enn honum.

Tað er tí greitt, at Alonso hevur nógv at prógva hetta vikuskiftið, tí byrjar hann ikki at vísa, at hann megnar at standa ímóti trýstinum frá liðfelaganum, so veksur trýstið alsamt, og hansara higartil sera góða umdømi kann gerast minni gott. Hamilton hará fturímóti hevur á fyrsta sinni smakkað ein sigur, og verður ikki lættur at steðga.

### Hamilton vinnur

Seinast misti Ferrari enn eitt fótafet í HM kappingini, við at eisini BMW vóru skjótari enn teir, og orsakað av óhepnum umstøðum við trygdarbilinum á breytini endaðu eisini ein Williams Toyota og ein Renault bilur frammanfyri Ferrari bilinum hjá Räikkönen. Vikuskiftið gjørdist uppaftur verri, tá Felipe Massa var diskvalifiseraður fyri at koyra framvið einum reyðum ljósi á veg úr pittinum. Tí hevur Ferrari nógv at prógva, men tað man vera ivasamt, at liðið megnar at avbjóða McLaren bilinum hjá Hamilton, ið frammanundan tykist, sum nógv besta boðið upp á ein vinnara.